


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 05 - 2012

# Faroe Petroleum borar Cooper brunnin

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið nú er byrjað at bora á Cooper leitimiðinum í Norska Havinum. Felagið eigur 30% av loyvinum. Cooper leitimiðið er á loyvi PL477 á Haltenbankanum, ímillum Smørbukk framleiðslueindina eystanfyri og Morvin framleiðslueindina vestanfyri. Cooper leitimiðið er óroynt; høvuðsmiðið er somu fláirnar sum jarðgoymslurnar á Smørbuk og Morvin framleiða úr. Centrica Resources (Norge) AS, ið eigur 40% av loyvinum, er fyristøðufelag, meðan Suncor Energy Norge AS og Faroe Petroleum Norge AS, eiga 30% hvør. West Alpha boririggurin verður nýttur til boringina. Felagið fegnast um, at hesin spennandi brunnurin á Haltenbankanum, sum er eitt av tess kjarnuøkjum, nú verður boraður. Cooper leitimiðið kann vera stórt, og tað liggur nær við fund, sum felagið hevur luttikið í, nevnliga Fogelberg og Maria. Seinni í mai mánaða fer felagið undir at bora Clapton leitibrunnin í norska partinum av Norðsjónum, har Faroe Petroleum verður fyristøðufelag, og luttekur við 40%. Í løtuni verður North Uist leitibrunnurin boraður vestanfyri Hetland, har felagið luttekur við 6.25%.